

# Boripallur og veitingarskip við kós móti Føroyum

**Jan Müller**

06.05.2014 - 21:25

Oljan.fo

Mong eru tey, sum leingi hava bíðað eftir løtuni, tá hol aftur verður sett á føroysku undirgrundina fyri at finna oljuna. Nú gongur tað eisini heilt skjótt til at borurin aftur verður settur í.

Boripallurin West Hercules siglir í løtuni frá Barentshavinum við kós móti landgrunninum.

Og bæði skipini, sum skulu vera um og ganga pallinum til handa, tá hann fer at bora tveir brunnar komandi hálva árið, eru í hesi løtu eisini ávegis til Føroya.

Sjóborg hjá Skansi Offshore, sum skal røkja uppgávuna sum veitingarskip, kemur á Runavík í morgin. Og sama er galdandi fyri Esvagt Don hjá Esvagt Thor, sum skal vera hjálparskip

hjá pallinum. So oljuhavnin í Runavík verður av álvara karmur um komandi boringar næstu dagarnar. Flutningsskip hevur longu verið á Runavík tríggjar ferðir við útgerð til boringarnar.

Enn er ikki heilt greitt, nær tað verður “spuddað”, sett á at bora, sum tað eitur á oljumáli. Men tað verður óivað í vikuskiftinum.

West Hercules skal fyrst bora Brugdan 2 brunnin lidnan. Sett varð á hetta leitimiðið fyri tveimum árum síðani men av ymsum ávum varð boringin steðgað tá fyri at vera uppafturtikin seinni. Eftir tann brunnin fer pallurin beina leið til Súlan/Stelkur leitimiðið nær markið at bora seinna brunnin í ár.

   